

# Latið okkum standa saman um eitt samfelag har rúm er fyri øllum

**Niðanfyri prenta vit nýggjársrøðuna, sum Kaj Leo Johannesen, løgmaður, helt nýggjársaftan:**

**Gott kvøld øll somul!**
Í kvøld leggja vit farna árið aftur um bak. Vit ganga aftur móti ljósari tíðum og fara undir eitt nýtt ár við nýggjum avbjóðingum og møguleikum.

Árið hevur verið merkt av búskaparligum rembingum um allan heim. Hesar eru nú um at hasa av. Metingar siga, at gongd kemur aftur á heimsbúskapin komandi ár, og vit kunnu loyva okkum at vænta, at føroyski búskapurin aftur fer at vaksa.

Okkara búskapur er lutfalsliga væl fyri. Vit hava megnað at staðið ímóti búskaparliga lágtrýstinum. Men leiðin úr aldudalinum verður helst long, og vit fara neyvan at uppliva sama bráðvøkstur eins og undanfarin ár.

***

Søgan hevur víst okkum, at tey samfeløg, sum megna at umstilla seg og fremja neyðugar broytingar rættstundis, standa seg best.

Vit føroyingar hava altíð livað av náttúruni, har gongdin skiftir millum góð ár og ring ár, og í øldir hava vit búleikast eftir meginregluni um at brúka eftir førimuni.

Javnvág er ikki millum inntøkur og útreiðslur hjá landshúsarhaldinum. Tí er útreiðsluvøksturin á fíggjarlógini fyri komandi ár minkaður munandi samanborin við undanfarnu árini. Harumframt eru lógarbroytingar framdar, sum geva landskassanum fleiri inntøkur, og játtanin til íløgur er hin størsta nakrantíð, tá útbyggingin av flogvøllinum er tikin við.

Málið er at fáa javnvág í almenna raksturin innan 3 til 5 ár.

***

Tað áliggur okkum at skipa samfelagið soleiðis, at øll hava møguleika at skapa sær eina góða og trygga tilveru. Eitt samfelag, har arbeiði er til allar hendur. Eitt samfelag, har komandi ættarlið støðast og vilja seta búgv.

Í árinum 1900 skrivaði Andrass Samuelsen, sum seinni gjørdist løgmaður: "Væl er okkara land fátækt, men um Føringar við øllum sínum vilja og av allari megi vilja løna sínum fosturlandi sum góð børn móður síni, so er landið ikki fátækt."

Føroyar eru ikki longur eitt fátækt land. Vóru tíðirnar trongar, ella tóktust avbjóðingarnar øgiligar, fullu vit ikki í fátt. Altíð var vilji at løna fosturlandinum. Altíð vóru hendur, sum vildu taka tøk, tá ið á stóð. Og altíð var áræði at taka við nýggjum avbjóðingum.

Langt hava vit vunnið fram á leið hesi 100 árini, og okkara ríka samfelag byggir á avrik hjá kvinnum og monnum, sum undan okkum hava stríðst á sjógvi og á landi.

Gott er at kenna hitan av hondum, ið sleptu.

***

Fyri at menna okkara vælferðarsamfelag og veita borgarunum betri tænastur, mugu vit eisini taka tøk og fremja grundleggjandi tillagingar.

Hetta arbeiðið er byrjað. Í morgin skriva vit ein nýggjan kapitul í heilsusøgu Føroya, tá nýggj skipan við almennari heilsutrygd kemur í gildi. Skipanin er samhaldsføst og ger umsitingina smidligari og bíligari. Ein meginregla er, at tey, sum hava størsta tørvin á heilivági, fáa mest í stuðli.

Nýggj pensjónsskipan verður sett í verk í komandi ári. Endamálið við skipanini er at tryggja øllum borgarum virðilig ellisár, har tey, sum hava møguleika, rinda til egnu eftirløn, meðan landið tryggjar tey, ið ikki hava havt møguleika til at spara upp til sína egnu pensjón.

Kommunuøkið verður nýskipað. Eindirnar verða færri og sterkari, so meir fæst fyri skattakrónurnar. Kommunurnar verða betri førar fyri at røkja